## Kærleiki í kreppuni

Internetheimasíður, sum geva fólki møguleikar at fáa samband við onnur fólk, hava jól og góðar dagar í hesum krepputíðum. Tað skrivar danska blaðið metroXpress. Talan er um tær sokallaðu "dating-síðurnar", og ein kanning hjá blaðnum vísir, at fíggjarlig trongstøða og vandin fyri at missa arbeiðið fáa fólk at leita sær stuðul frá øðrum. Nigel Rasmussen, sum var við til at stovna heimasíðuna Elitedaters.dk, sigur við metroXpress, at áhugin fyri "dating" er vaksin nógv teir seinastu mánaðirnar. Aðrar heimasíður siga við blaðið, at vøksturin liggur millum 25 og 30 prosent.



## Umboðsmaðurin kannar veiðiferðir

Fólkatingsins Umboðsmaður hevur gjørt av at kanna, um tað var í lagi, at fyrrverandi búskapar- og vinnumálaráðharrin Bendt Bendtsen tók av tilboðum frá vinnufyritøkum um ókeypis veiðiferðir. Hans Gammeltoft-Hansen, umboðsmaður, sigur, at hann hevur biðið vinnumálaráðið um eina viðmerking til eina grein í blaðnum B.T., sum tann 15. mars skrivaði, at Bendt Bendtsen var á 33 veiðiferðum í árunum frá 2003 til 2008, og at vinnufyritøkur rindaðu fyri hann. Millum annað skal vinnumálaráðið greiða frá, hvat endamálið var við tiltøkunum.

# Bellamy Brothers til Føroya í mai

**Síðani teir sungu og spældu í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn á heysti í 2007, hava David og Howard Bellamy havt eitt ynski um at komið aftur til Føroya. Nú gongur ynskið upp, tí leygarkvøldið 16. mai fara teir at hava stóran countrydans í KÍ-høllini í Klaksvík**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Føroyski alskurin til countrytónleik à la Bellamy Brothers og aðrar bólkar og einstaklingar fornoktar seg ikki, og nú verður so enn eitt høvi at hoyra teir báðar heimsgitnu beiggjarnar úr Florida, tí leygarkvøldið 16. mai hava teir stóran countrydans í KÍ-høllini í Klaksvík.

Millum ár og dag er tað ikki smávegis, ið er komið frá Bellamy Brothers, tí síðani 1976 hava teir givið út 29 studioútgávur, eina live-útgávu, 14 uppsamlingar og 70 stakútgávur, umframt at teir hava verið við á øðrum útgávum. Heilar 11 ferðir eru sangir teirra endaðir ovast á tindunum.

Hetta er aðru ferð, Bellamy Brothers vitja í Føroyum, og tá teir vóru her á heysti í 2007 og høvdu konsert í Havn, var nógv fólk og lurtaði eftir góðum og gomlum slagarum, so sum "Let Your Love Flow", "If I Said You Had a Beautiful Body Would You Hold It Against Me", "Redneck Girl" og fleiri øðrum.

### Koma nú aftur til Føroya

Føroyavitjanin hevði eisini stóra ávirkan á David og Howard Bellamy, sum síðani hava havt eitt brennandi ynski um at kom aftur hendavegin. Tá Hallur Joensen var í Nashville og tók fløgu sína upp, var tosað við fleiri av tónleikarunum hjá Bellamy Brothers, sum eisini søgdu, at teir fegnir vildu komið aftur til Føroya.

Nú er hetta so fingið í lag, og lagt er upp til enn eitt ógloymandi kvøld við Bellamy Brothers – hesa ferð í KÍ-høllini í Klaksvík. Dyrnar lata upp klokkan 22, og fram til kendu gestirnir trína á pallin klokkan 23.30, fer blandaður country-tónleikur at seta sín dám á og skapa rætta lagið í høllini.



Tá so David og Howard Bellamy koma framat, fara teir at spæla í hálvanannan tíma, so her er altso eitt ríkt høvi at uppliva stóru stjørnurnar á føroyskum palli. Og tá teir eru lidnir, fer Hallur Joensen at spæla í einar tveir til tríggjar tímar, so hetta verður eitt country-kvøld frá byrjan til enda.

Fyrireikarar av hesi forkunnugu konsert eru Klaksvíkar Billardfelag og Allan Samuelsen, og atgongumerkini til konsertina, sum kosta 350 krónur eru at fáa í FK-handlunum kring alt landið.

## Tróndur Patursson og Thorvald Stoltenberg í Rás2

Fríggjamorgunin verða tveir litfagrir og spennandi persónar at hoyra í morgunsendingini hjá Rás2. Teir eru listamaðurin Tróndur Patursson og fyrrverandi norski uttanríkisráðharrin Thorvald Stoltenberg

Tann 1. mars fylti Tróndur Patursson 65 ár. Hann varð tá stæddur umborð á Norrønu, og Jan Müller fekk orð á hann. Í samrøðuni fara teir víða í lívinum hjá Tróndi bæði sum listarmaður og ævintýrari. Tróndur greiðir frá fleiri av sínum mest spennandi uppgávum sum listamaður og eisini hvørji ynski og dreymar hann hevur um framtíðina. Samrøðan verður at hoyra í Rás2 umleið klokkan 9.30 fríggjamorgun.

Eftir hesa samrøðuna fer Rás2 at senda fyrilesturin, sum Thorvald Stoltenberg helt í Norðurlandahúsinum í farnu viku á ráðstevnuni um Føroyar í framtíðar Europa.





# Kringvarpið kjakast um um Public Service

KRINGVARP
*Tíðindaskriv*

Í kvøld seta Kringvarpið og Nordfag Public Service á breddan. Tað verður gjørt við almennum kjakkvøldi í Útvarpshøllini í Sortudíki. Á skránni verða framløgur og kjak um public service, har vit millum annað viðgera spurningarnar:

- Eiga vit yvirhøvur at hava Public Service í Føroyum?

- Eigur Kringvarp Føroya framvegis at hava Public Service skylduna? Ella eigur Mentamálaráðið at bjóða hana út í almennari lisitasjón?

- Hvussu fíggja vit Public Service?Skal tað gerast við lurtara- & hyggjaragjaldi ella umvegis skattin/fíggjarlógina? Ella eigur Public Service at fíggjast við lýsingum, stuðlum og sponsorum?

- Ber til at hava Public Service uttan Public Service sáttmála millum Mentamálaráðið og Public Service veitaran?

Bill Justinussen, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, og Allan Dalsgarð, deildarleiðari í Kringvarpinum, leggja fyri. Síðani fara Birgir Kruse, fjølmiðlafrøðingur, Jógvan Hugo Gardar, næstformaður í Føroysk Miðlafólk, Magni Laksafoss, formaður í Mentanarnevnd løgtingsins og Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í kringvarpsmálum, at kjakast um public service.

Kjakkvøldið er alment, og áhoyrarar hava møguleika at seta spurningar til pallborðið. Øll eru vælkomin til kjakkvøld um public service í Útvarpshøllini hóskvøldið 19. mars klokkan 19:30. Alt tiltakið verður somuleiðis sent beinleiðis í útvarpinum.

*- Eigur Kringvarp Føroya framvegis at hava public service skylduna, ella eigur Mentamálaráið at bjóða hana út í almennari lisitasjón? Soleiðis ljóðar ein av spurningunum, sum verða settir í útvarpshøllini. Jón Brian Hvidtfeldt er tíðindaleiðari í Kringvarpi Føroya*

